gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Kundi ikki verið annað enn barnalækni



*- Fáa foreldur at vita nágreiniliga, hvat bagir barni teirra, hvussu framtíðin sær út, og hvørji útlitini eru, er tað nógv lættari hjá teimum at fata og koma til sættis við, hvat hendir og góðtaka tað, sigur Sepideh Taheri.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**- At arbeiða sum barnalækni er ógvuliga lívsjáttandi og spennandi. Børn hava ótrúlig evni at batna og koma fyri seg eftir eina álvarsliga sjúku. Tey eru ógvuliga stríðshugað, og vilja mennast og gerast betri. At síggja glað børn og glað foreldur er ein vinningur í sjálvum sær, sigur Sepideh Taheri, barnalækni á Landssjúkahúsinum.**
**Í dag fer hon í farloyvi, men hon kemur aftur til Føroya at arbeiða um eitt ár**

*Turið Kjølbro*

Barnaárini í Onglandi hoyrdi hon hvønn dag Føroyar nevndar í veðurtíðindunum fyri havleiðirnar. At Føroyar liggja í Norðuratlantshavi visti hon eisini, men ikki stórt meiri enn tað.

- Tá beiggi mín fór til Føroya at arbeiða sum lækni eitt stutt skifti fyri fimm árum síðani, vitjaði eg hann í eina viku. Hetta var seinasta árið í venjingini í míni útbúgving sum lækni, sum varð liðug árið eftir í september. Eg hevði sett mær fyri at vitja sjúkrahúsini fyri at vita, hvussu alt sá út. Eg varð fangað beinanvegin. Fekk at vita, at stórur tørvur var á barnalæknum, og eg fekk eisini í boði at vera við í pcb-granskingini av føroyskum børnum. Í nakrar mánaðir hugsaði eg um hetta, og gjørdi av at fara til Føroya at arbeiða í eitt ár. Beiggi mín var júst tá liðugur sum lækni og eisini hann gjørdi av at fara til Føroya at arbeiða, greiðir Sepideh Taheri, barnalækni á Landssjúkrahúsinum, frá.

## Eina árið gjørdist til fýra.

- Tá ið vit høvdu verið her eina tíð, sóu vit, at Føroyar eru eitt gott land at búgva í. Vit hava fingið nógvar góðar vinir fyri lívið. Hetta hevur verið ein góð og stuttlig tíð, sigur Sepideh, sum tosar føroyskt raðið. Málið hevur hon lært við at lesa føroyskt og tosa málið burturav í sínum arbeiði.

Í dag er seinasti arbeiðsdagur hennara í hesum umfarinum. Nú fer hon saman við familjuni aftur til Onglands, men kemur aftur um eitt ár. Maður hennara, Andrew Hicks, ið er útbúgvin biokemikari, arbeiddi sum granskari í París, tá ið Sepideh fór til Føroyar, men er síðani komin hendavegin. Hann fekk arbeiði í íslendsku fyritøkuni DeCode, sum fæst við arvagransking. Arbeiðssetningur hansara er eitt nú at grundleggja gransking í Føroyum, arvagransking og aðra gransking.

- Arvagransking er framtíðin. Tað er í arvinum, vit kunnu finna út av, hvat er grundleggjandi galið. Tað er har vit finna røttu viðgerðina og fyribyrgjandi evni at viðgera við. Grundin til, at vit koma aftur til Føroya er millum onnur henda spennandi avbjóðingin og sjálvsagt eisini mítt arbeiði sum barnalækni. Har liggur nógv arbeiði á láni.

*»Aðra staðni er tíverri rættiliga vanligt at síggja børn, sum eru kropsliga misrøkt. Eg havi einki sæð til hetta í Føroyum hesi árini«*

Sepideh og Andrew hava fingið eina dóttir, Arianne, sum í dag er tvey eitt hálvt ára gomul. Foreldur Sepideh, sum búðu í Skotlandi, hava verið í Føroyum síðani Arianne varð fødd. Í fyrsta umfari fyri at taka sær av Arianne, sum vantaði barnaansing.

- Teimum dámar væl í Føroyum, men halda tó, at veðrið kundi verið betri, sigur Sepideh.

Foreldur Sepideh búseta seg nú aftur í Skotlandi, og maður Sepideh fer framhaldandi at arbeiða við arvagransking í Íslandi og í Føroyum.

- Vit eru von við at hava arbeiði í útlondum og at vera nógv burtur frá hvør øðrum. Tað er hart, men tað gongur. Hetta er ikki so nógv øðrvísi enn hjá nógvum føroyskum kvinnum, sum hava mann á sjónum.

## Fara og koma

Orsøkin til, at Sepideh fer av landinum nú, er, at henni vantar eitt hálvt ár í útbúgvingini sum serlækni. Kravið er, at hendan tíðin skal takast á einum stovni, sum ikki er sjúkrahús.

- Tað er gott og spennandi at fáa tær royndirnar afturat, men mær dámar best at arbeiða á sjúkrahúsi og at taka mær av børnum, sum gerast sjúk akutt, sigur Sepideh, sum ætlar sær at fáa sær aðrar royndir innan sítt øki sum lækni meðan hon verður í Onglandi komandi árið.

- Fært tú ikki nýggjar royndir, mennist tú ikki og tú steðgar upp. Eisini um tú verður á einum arbeiðsplássi ov leingi.

At vera barnalækni í Føroyum, er ikki minni avbjóðandi enn aðra staðni, heldur Sepideh.

- Her eru allar tær vanligu sjúkurnar, sum síggjast alla staðni. Serliga um veturin gerast nógv børn rættiliga sjúk. Tá eru nógvar brunasjúkur, helst orsakað av veðrinum. So eru eisini stoffskiftissjúkur, sum arvast nógv, og aðrar serligar sjúkur. Av einum barnalækni krevst ein breið útbúgving og breið vitan um allar hesar sjúkurnar fyri at kunna staðfesta tær og viðgera tær. Í Føroyum eru nøkur dømi av øllum.

Børn í Føroyum hava tað gott. Tey liva tætt upp at náttúruni og í mun til aðra staðni er tað friðarligt í Føroyum, heldur Sepideh.

- Aðra staðni er tíverri rætti liga vanligt at síggja børn, sum eru kropsliga misrøkt. Eg havi einki sæð til hetta í Føroyum hesi árini. Hinvegin veit eg, at kynslig misnýtsla av børnum ikki er eitt óvanligt fyribrigdi í Føroyum.

Arbeiðið sum barnalækni er ógvuliga lívsjáttandi og positivt.

- Ringt er at taka einstakar hendingar fram um aðrar, men tað eru alla tíðina børn, ógvuliga sjúk børn, sum gerast frísk. Verður sjúkan diagnoserað rætt og rætta viðgerðin sett inn, verða tey allar flestu børnini frísk aftur. Børn hava ein ótrúligan førleika at batna og koma fyri seg. Tey eru ógvuliga stríðshugað, tá ið tað kemur til at basa eini sjúku. Tað er íbygt í teimum, at tey vilja mennast og gerast betri. At síggja glað børn og glað foreldur er ein vinningur í sjálvum sær.



*»Intellektuelt er tað ógvuliga stimbrandi at vera barnalækni, ikki minst tí, at eitt lítið barn ikki kann siga frá, hvat tí bagir«*

- Á Landssjúkrahúsinum hava vit tikið móti einum barni, sum var føtt fýra mánaðir ov tíðliga og vigaði bara 700 gramm. Sama dag, barnið varð føtt, fóru vit til Aberdeen við tí. Í dag er tað eitt ár og hevur tað ógvuliga gott. Eisini eru nógv børn, sum hava havt menigitis, komin rættiliga væl fyri seg uttan stórvegis trupulleikar. Fleiri slík dømi eru. Tað er hetta, sum er so positivt við at vera barnalækni. Eg kundi ikki verið nakað annað, til dømis ein sum bara arbeiddi við gamlamannasjúkum.

Treyðugt so gongur ikki altíð eftir vild. Tá er tað sera týdningarmikið at geva foreldrunum og starvsfólkunum góð ráð.

- At geva ráð, samskifta væl og geva sær tíð til foreldur og starvsfólk er næstan tann týdningarmesti parturin av mínum arbeiði. Øll foreldur eru bangin um síni børn, tá ið tey gerast sjúk. Fáa tey at vita nágreiniliga, hvat bagir barni teirra, hvussu framtíðin sær út, hvørji útlitini eru, eftirlit og viðgerð, er tað nógv lættari hjá teimum at fata, hvat hendir barni teirra og koma til sættis við og góðtaka tað. Tí er umráðandi at geva teimum nógva tíð soleiðis at tey kunnu spyrja um alt og siga, hvat tey hava hug til. At undirvísa starvsfólk er ikki minni umráðandi, at tey fylgja við í øllum, sum fer fram soleiðis at vit hava eitt gott lið av starvsfólki.

- Samskiftið, upplýsing, samkensla og tíð er tað týdningarmesta í teimum førum, tá ið einki er at gera. Sjálvsagt ávirkar tað eisini meg, tá ið eg havi við eitt ógvuliga sjúkt barn at gera. Sum barnalækni eri eg ógvuliga nógv innblandað og virkin í tí, sum fer fram. Men dugir tú ikki at halda eina ávísa frástøðu, ber ikki til at arbeiða og taka røttu avgerðirnar. Professjónella linjan má haldast alla tíðina. Tað er ikki altíð lætt, men eg havi lært tað. Ikki øll kunnu vera barnalækni av tí sama, men eg kundi ikki verið nakað annað. Eftir at eg sjálv havi fingið eina dóttir, skilji eg betur, hvat foreldur fara ígjøgnum, hvat tey hugsa um og eru bangin fyri, tá ið tey hava eitt sjúkt barn.

- At vera barnalækni er eisini ógvuliga spennandi. Intellektuelt er tað ógvuliga stimbrandi, ikki minst tí, at eitt lítið barn ikki kann siga frá, hvat tí bagir. Sergreinin sum barnalækni fatar um nógv øki og tí síggi eg nógv ymiskt alla tíðina. Her eru børn sum eru 14 vikur ov tíðliga fødd og 14 ára gomul børn. Eitt ógvuliga breitt spektrum sum hevur ymiskar avbjóðingar við sær. Tá ið sjúka verður staðfest tíðliga, ber ógvuliga væl til at fyribyrgja størri avleiðingar seinni, sigur Sepideh, ið leggur afturat, at møguleikarnir fyri at gera fyribyrgjandi arbeiði á Landssjúkrahúsinum ikki eru so góðir vegna vantandi starvsfólk.

## Vórðu forfylgd

Fyrstu barnaárini vaks Sepideh Taheri upp í Iran. Mamman er russisk og pápin persi, og øll eru tey bahai. Tað hevur ongantíð verið lætt at verið bahai í Iran, tað er tað framvegis ikki í dag, hóast bahai er størsti átrúnaðarligi minnilutin í landinum, umleið 400.000 í tali. Kristin og jødar hava harafturímóti verið viðurkend og hava varðveitt vanlig mannarættindi. Altjóða felagskapir og stjórnir um allan heim hava trýst á myndugleikarnar í Iran í nógv ár og skipað fyri ymsum herferðum fyri at geva bahaiarum frið at virka og liva. Undir islamsku kollveltingini vórðu nógvir bahaiarar forfylgdir og tiknir, nógv vórðu sett í fongsul og tikin av døgum. Familjan Taheri náddi at flýggja beint áðrenn.

- Tá ið vit fóru, var nógvur ófriður í landinum, og nógvir skúlar vórðu afturlatnir. Vit komu í øllum góðum av landinum, greiðir Sepideh frá.

Hon var smágenta, tá ið familjan flýddi úr heimlandinum. Fyrst fóru tey til Norðurírlands og síðani til Onglands. Sepideh hevur lisið í Aberdeen og London, har hon hevur tikið sergreinina sum barnalækni.

Týdningarmesta endamálið hjá bahaiarum er at arbeiða fram ímóti heimsfriði og at beina fyri fordómum, sum skilja fólk sundur. Í frítíðini skipa Sepideh og beiggi hennara fyri skeiðum um heimsfrið. Tey hava verið uttanlands, eitt nú í Íslandi og hildið skeið. Enn er einki slíkt skeið hildið í Føroyum, tí umstøðurnar hava ikki verið til tað.

*»Eftir at eg sjálv havi fingið eina dóttir, skilji eg betur, hvat foreldur fara ígjøgnum, tá ið tey hava eitt sjúkt barn«*

- Okkara arbeiði, sum er grasrótsarbeiði, er serliga ætlað ungfólki í útbúgvingaraldri. Tað er sera týdningarmikið at tey skilja tað, sum fer fram í heiminum, hvørjir trupulleikarnir eru fyri at kunna síggja, hvat skal til fyri at broyta heimin. Tá ið tú arbeiðir fram ímóti einum hægri endamáli, er lættari at síggja burtur frá smálutum. Í øllum sambondum, sigur Sepideh Taheri, sum at enda sendir eina heilsan til øll, hon hevur arbeitt saman við og børn og foreldur, hon hevur verið í sambandi við.

- Eg takki fyri, at øll hava tikið so væl ímóti mær og míni familju, at vit eru góðtikin, eru stuðlað og at vit hava fingið møguleika fyri at hava tað so gott. Vit síggjast aftur næsta ár.



*- Sepideh Taheri, barnalækni á Landssjúkrahúsinum. Sepideh merkir »dimmalætting« og Taheri merkir »av tí reina«.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

gult15 cyan15 magenta15 svart15